


# Endiliga ....

UMMÆLI

*Victor Carlsen, skrivar*
*Myndir: Jens Christian Vang*

Nógv hava vit sæð, lisið og hoyrt um henda nógv umtalaða svenska sangfuglin, og tann sangstíl, hon hevur umboðað øll tey 25 árini hevur verið virkin. Tað var í 1983 at sangluttøka hennara við sanginum "Främling" fullkomiliga vendi upp og niður á tilveru hennara, og fram til dagin í dag hevur kristiligi sangurin verið hennara sermerki.

Nógvar eru lívsroyndirnar hjá hesum úrmælingi, sum hevur megnað at hildið verkið gangandi øll hesi 25 árini, og tað skal stór styrki til, tí tað er jú ikki sum at siga tað at vera í hesi vinnuni, tí ágangurin er nógvur, og ikki minst freistingarnar kunnu fara við einum, hagar tað ikki altíð vendist aftur. Soleiðis uppliva mong tað, men Carola hevur megnað at staðið føst, tá bylgjurnar hava leikað sum harðast.

## Føroyavitjanin

At tað nú hevur eydnast konsertfyrireikarum at fáa fatur á Carolu, er ikki minni enn ein meistaraverk, og tøkk skulu Five Star Mannagment hava fyri hetta. Væl varð fyriskipað, og konsertini var jú útseld eftir fimm døgum, so sigast má, at áhugin at hoyra hana hevur verið ovurhonds stórur. Um skipað varð fyri tveimum konsertum hevði heldur ikki bilað, men hetta má bíða til eina aðru ferð, og tað hevur Carola longu lovað, at henda Føroyavitjanin verður ikki tann seinasta.

Henni dámar væl seyð, og sum eg skilti tað, hevði hon einki haft ímóti at ein seyður kundi verið við á pallinum hetta kvøldið, men hinvegin, so smakkar kjøtið jú sera væl, og so má hetta bíða til jóladøverðanheima, har seyðakjøt verður notið sum jólamatur.

## Jól í Betlehem

Henda konsertin við hesum undirheiti var tann fyrsta av fleiri, sum fara at verða hildnar runt um í Norðanlondum komandi vikurnar. At hetta fellur inn í adventina ger heldur einki, tí við hesum tori eg at siga, at vit øll komu í tann rætta jólastemningin, sum tikið verður til. Ikki bara ein stemning, men eisini skilt soleiðis, at vit kundu seta okkum inn í sjálva hendingina til, hví vit halda jól, sum hetta kvøldið so týðuliga gav øllum eina kenslu av, bæði í sangi og handling. Bæði ljós og pallpynt vísti týðuliga at Carola tvær ferðir hevur vitjað í føðibýinum Betlehem, og hetta setti sín serstaka dám á

Stuttligt var at síggja, hvussu væl skipað konsertin var, har vit nærum kronologiskt kundu fylgja gongdini sum ein ímynd av, tá Jesus varð føddur. Byrjað varð við at lítla Mirjam kom inn á pallin við ljósi í hond og sang sangin "Nú tendrast túsund jólaljós" og so kom sjálv Carola inn og sang á svenskum sama lagið. Ein sera vøkur byrjan. Vit hoyrdu eisini sangir um "Mitt hjerte altid vanker", "Jul, jul, strålande jul", "Kristus är kommen", "I denne julenatt" og "Ett barn är føtt i denna dag". Sjálv lýsingin varð endurspeglað við sjónleiki um fjósið, Mariu, Jósef og lítla barnið í krubbuni, vitjað av einglum og hirðum. Harumframt fingu vit upplestur, ið týðuliga greiddi frá tí, ið boðað var av einglinum Gabriel um føðing Jesu. Sera væl hóskandi kom sangurin, sum Carola sjálv hevur skrivað: "Himlen I min famn".

Sangurin "Drummer boy" varð sungin og vit fingu eisini frágreiðingina um henda sangin og tann týdning, hann hevur. Vit eru hvør einstakur ein Harrans tænari, sum ikki tørvar at spyrja, hvat eg kann gera fyri at geva at hjálpa mínum næsta. Hesin lívsstílur kann á ein hátt gerast okkara kærleiksmál.

Hugaligt var at síggja, hvussu Carola royndi at fáa kontakt við fjøldina, og hetta gjørdi hon við at ganga oman í salin, meðan sangurin hjá Thore Ås: "En stjerne lyser så klar", har hon síðani fekk stóran riðil av børnum upp á pallin og kundi práta við tey. Fáorðað børn, men kortini ein góð kontakt við foreldur og børn. Tá so 9-ára gamla Mirjam eftir hetta byrjaði við sanginum "Tað lítla ljós eg fekk", kom rættuligt lív í, og eftirfylgjandi fingu vit góðar og vælkendar gospelsangir so sum, "Go tell it on the mountain", "He´s got the whole world in His hand" og "I´m gonna keep on singing". Tað kendist veruliga sum at Carola hevði fingið ta kontakt, hon vildi hava og rósti mannfjøldini fyri góða luttøku, tí væl varð klappað.



*Tað tók bara fimm dagar at selja øll atgongumerkini til konsertina hjá Carolu*